# Makkur

Matarsteðgurin var altíð ringasta tíðin á degnum. Magin føldist innholaður, tí hon hevði ikki etið síðan í gjárkvøldið. Hon plagdi ongantíð at eta morgunmat, sjálvt um foreldrini altíð plágaðu hana um tað. Tað suðaði av práti og tallerkum í kafeteriuni - fólk, ið flentu ov hart, gaflar, sum skavaðu niður í tallerkarnar. Hon hugdi út á havið av næmingum, áðrenn hon kvikliga snaraði inn á vesið, stongdi hurðina og gleið stillisliga niður á gólvið.

Eingin annar var á vesinum. Tað einasta hon hoyrdi, var surrið av lampuni uppiyvir henni. Hon hálaði knøini tætt inn at bringuni og hugdi niður í tað kalda gólvið. Long tíð var farin, síðan hon byrjaði at sita soleiðis í matarsteðginum. Kanska var tað eftir fyrstu ella aðru vikuna. Í fyrstani hevði hon roynt at sitið heilt aftast í kafeteriuni, men tað var ikki lætt at sita einsamøll.

Matarsteðgurin føldist altíð endaleysur. Hon tók telefonina fram og hugdi at klokkuni. 20 minuttir eftir. Viðhvørt sat hon og hugsaði um, um hini í skúlanum løgdu merki til, at hon ikki var í kafeteriuni longur. Eingin segði nakað um tað, men hon hugsaði eisini, at tað var best at vera einsamøll. Um eingin hugsaði um hana, fór heldur eingin at plága hana. Tað var best soleiðis. Klokkan ringdi, og hon reisti seg av vesigólvinum. Hon hugdi í speglið, men hon kendi ikki persónin, ið hugdi aftur eftir henni. Hon stappaði tann óupplatna matpakkan djúpt niður í skrellispannina.

Tað vóru ikki meira enn tríggir mánaðir, síðan hon byrjaði í nýggja skúlanum. Eingin visti, hví hon veruliga noyddist at flyta. Tað var nokk best, at hini bara hildu, hon mátti flyta, tí foreldrini høvdu fingið nýtt arbeiði, ella tí onkur happaði hana í hinum skúlanum. Sannleikin var nógv, nógv verri enn tað.

Skúlaklokkan ringdi fyri seinastu ferð á degnum. Øll pakkaðu saman og skundaðu sær í bussar og bilar fyri at sleppa heim í vikuskifti. Áðrenn hon hevði slongt taskuna um herðarnar, vóru øll longu farin. Tað skal sigast, at hon drálaði eitt sindur. Henni dámdi altíð best at ganga fyri seg sjálva, uttan at fólk gingu og lammiteraðu frá vinstru og høgru.

Komin út um skúlagarðin føldist alt lættari. Sólin skein hvørki oman ella niðan, men tað legði hon einki í. Dagarnir vóru stuttir, og skýggj lógu sum ætlað uppiyvir henni. Tað var longu

hálvgum myrkt uttanfyri. Hon gjørdi av at fara til gongu heimeftir, tað skuldi kortini ikki tikið longri enn einar 15 minuttir.

Regndropar brustu á bløðini í viðarlundini. Ælið kom sum burtur úr ongum. Hon krokaði undir einum stórum træi, meðan hon vónaði, at tað ikki fór at vara leingi. Brádliga varnaðist hon, at onkur stóð undir einum træi eitt sindur burturfrá. Eitt lítið og skirvisligt skepilsi í gulum náttklæðum. Millum fingrarnar darlaði ein dýggjvát, hvít bamsa. Lítli smádrongurin hugdi ósekur at henni, meðan hann kroysti bamsuna so hart, at vatnið fossaði úr henni.

Hon klípti seg sjálva fyri at vita, um hon fór at vakna úr einum ringum dreymi, men smádrongurin stóð har við sama lag. Hon visti væl, hvør hann var, og hann visti eisini, hvør hon var. Hon vildi spyrja hann, hvat hann vildi henni, men hon fekk einki sagt, og hon visti longu, hvat hann vildi. Hon fekk ikki flutt seg. Hjartað bukaði í hálsinum, og kuldasjálvtin spjaddist gjøgnum kropp hennara. Hon hugdi rundan um seg fyri at vita, um onkur, ið kundi hjálpa henni, var nærhendis, men eingin livandi sál var at síggja. Hon lenaði seg móti trænum og gleið stillisliga niður á kalda grasið. Hon hálaði knøini tætt inn at bringuni og blundaði. Hon visti, at tað ikki loysti seg at renna.

Hon flutti seg ikki, fyrr enn onkur tók í armin á henni og spurdi, um okkurt var galið. Tað var Makkur, ein drongur í hennara flokki. Hon hevði ongantíð tosað við hann, so hon visti ikki, hvat hann vildi henni. Hann helt sikkurt, at hon var í ørviti, tí hon sat og skalv undir einum træi í viðarlundini. Hon reisti seg og segði, at alt var í ordan. Hon bað hann sleppa sær til hús, sjálvt um hon visti, at tað longu var ov seint. Makkur svaraði og segði, at hann var á veg heim frá fótbóltsvenjing, og hann spurdi, um tey ikki skuldu fylgjast heimeftir. Hon sá á honum, at hann bara spurdi, tí hann hevði følt seg sekan, um hann læt eina gentu sita úti í viðarlundini alt kvøldið. Hon segði einki, hon hugdi bara niður í váta grasið. Hon visti, at einki var at gera. Skirvisliga skepilsið hugdi út undan trænum.

Hon klamsaði hurðina aftur, stongdi og blakaði váta jakkan og skógvarnar frá sær. Uttanfyri hoyrdust politibilar og sjúkrabilar, ið koyrdu við fullari ferð móti viðarlundini. Hon tók kuffertini úr skápinum.